# Djarvir amatørar

**Málið uttan motiv, skitsu ella ætlan. Og verður tað serliga vakurt, slettið tað so aftur, vóru boðini, 14 amatørmálararar fingu á máliskeiði hjá listamanninum Birger Møller í Klaksvík herfyri**



*Royndi listamaðurin, Høgni Thomsen, viðgongur, at málihátturin á skeiðnum var beint øvugt av tí, hann er vanur við*

*Mynd: Anna V. Ellingsgaard*

MÁLISKEIÐ
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*
*Myndir: Høgni Thomsen*

Eina løtu er púra kvirt inni. Tað einasta, ið hoyrist, er skavandi ljóðið av penslum móti løriftum. Runt um í rúminum eru málningar í ymsum støddum við at fáa skap. Mitt í hurlivasanum av staffelium og málibyttum situr listamaðurin og málilærarin, Birger Møller, og eygleiðir teir 14 skeiðsluttakararnar. Knappliga hoyrist knarrandi ljóðið frá einum nýføðingi í eini babylift undir einum borði. Ein av luttakarunum hevur tikið sína tveir mánaðar gomlu dóttur við sær á máliskeiðið hesar dagarnar. Tað er nevniliga ikki á hvørjum degi, at møguleiki er at fara á skeið í abstraktari málningalist hjá listamanninum Birger Møller, sum vanliga undirvísir á Århus Kunstakademi.

### Íblástur úr dulvitinum

Temaið á máliskeiðnum hjá Birger Møller í Klaksvík hesar dagarnar er verur av ymsum slagi og skapi. Og tað er týðiligt, at intensa frálæran av sonnum er kropin inn undir húðina á luttakarunum.

- Tá eg fór í song í gjárkvøldið, sá eg alskyns trøll, slangur og løgnar verur fyri mær, flennir Birgit Hansen, skeiðsluttakari.

Eins og fleiri av hinum luttakararnum, hevur Birgit verið á máliskeið fyrr hjá Archibald Black, men ongin av teimum hevur roynt nakað, ið líkist frálæruni á hesum skeiðnum.

Birgir Møller greiðir frá, at hann hesuferð gevur frálæru í sokallaða Cobra málihættinum. Í stuttum snýr hesin málihátturin seg um at mála uttan myndevni, skitsu ella ætlan, og í staðin lata íblásturin koma spontant og úr dulvitinum.

### Krevur dirvi

- Hetta er eitt sindur sum at vera í barnagarði aftur. Tað er stutt sagt ikki loyvt at gera eina skitstu áðrenn. Vanliga máli eg annars mest fólk og landsløg, so hetta er ein rættiliga stór avbjóðing, sigur Birgit Hansen, sum hevur havt málingina sum ítrív í eini tvey ár.

Birger greiðir frá, at við Cobra málihættinum er málningurin í grundini ein skitsa í nógvum løgum. Við meir siðvandum málihættum byggir tú málningin upp, meðan tú her mest sum brýtur hann niður. Verður tú ov glað fyri okkurt á málninginum, skalt tú helst sletta tað aftur. Annars byrjar tú at laga restina av málninginum eftir tí, og so hvørvur tað spontana, sigur Birger.

- Hesin málihátturin krevur faktiskt rættiliga stórt dirvi av luttakarunum. Tey mugu tora at sleppa øllum tí trygga og vælkenda, og tveita seg út, har tey ikki ána, um tey grynna, sigur Birger.

Heilt sleptir upp á fjall verða luttakararnir kortini ikki. Við jøvnum millumbilum hongur Birger onkran av málningunum upp, og metir um, hvat er gott, minni gott og hvat er vert at arbeiða víðari við.

### Ein annar máti at hugsa

Ein av meir royndu luttakarunum á skeiðnum er Høgni Thomsen, sum hevur virkað sum listamálari í mong ár. Tey flestu kenna Høgnasa myndir sum naturalistiskar og stílreinar. Hvussu ella um skeiðið fer at ávirka hansara málihátt í framtíðini, dugir hann ikki at siga. Fyribils kann hann bara staðfesta, at hetta er beint øvugt tí, hann plagar at gera.

- Stóri munurin er, at her máli eg innifrá og út, ikki útifrá og inn, sum annars, tá motivið stýrir, sigur Høgni og hyggur grunandi at myndini, hann er í ferð við at mála.

Birgit Hansen heldur tað verða rættiliga spennandi at síggja, hvat hetta máliskeiðið fer at føra til í hennara málningum.

- Hetta er ein heilt annar máti at hugsa og síggja tingini uppá. Eg havi lært rættiliga nógv, tí Birgir dugir ótrúliga væl at læra frá sær. Og er hann ikki bangin fyri at siga sína erligu meining, sigur Birgit.

### Málningakjak

- Hesin málningurin hevur fullkomiliga mist jørðforbindilsið,



*Abstrakti málihátturin fekk Birgit Hansen at kenna seg sum var hon í barnagarði aftur*